

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 03 - 2012

# Hóast turt í Grønlandi hevði Cairn metgott ár

Hóast Cairn Energy hevur brúkt væl av pengum upp á higartil úrslitaleysa oljuleiting í Vesturgrønlandi, royndist árið í fjør væl hjá felagnum. Roknskapurin, sum Cairn júst hevur lagt fram, vísir, at felagið hevði 4,6 milliardir dollarar í avlopi í 2011, og tað er tað besta úrslitið hjá felagnum nakrantíð. Men roknskapurin vísir eisini, at meginparturin av tí stóra avlopinum stavar frá, at felagið seldi síni áhugamál í India í fjør. Í ársfrágreiðingini staðfestir Cairn Energy, at leitiboringarnar í Grønlandi hava ikki givið nakað av sær enn. Hinvegin leggur felagið dent á, at allar kanningar geva ábendingar um, at olja er undir havbotninum í Vesturgrønlandi, og at boringarnar, sum eru gjørdar, hava givið felagnum ómetaliga virðismiklar upplýsingar, sum gera, at felagið framvegis væntar at fáa eitt gott úrslit í Grønlandi. Statoil komið uppí Samstundis fegnast felagsins leiðsla um, at Statoil er komið uppí sum samstarvsfelag á Pitu-leiðini í Baffinvíkini, har Cairn fer at gera ta næstu leitiboringina. Enn er ikki avgjørt, nær tað verður, men tann avgerðin verður tikin, tá úrslitið av teimum seismisku kanningunum av økinum kemur eina ferð tíðliga í summar. Hinvegin er greitt, at Cairn Energy fer ikki at gera fleiri seismiskar kanningar í Grønlandi í ár, men at felagið heldur fer at leggja seg eftir at kanna tær nógvu upplýsingarnar, sum tað longu hevur savnað.